Ferðin til Keltalands:

# Ótálmandi keltiski



Júst og Eirikur umborð á Stena Line-ferjuni á veg til Belfast

**Tann grøna oyggin er ikki so grøn longur. Írland verður saksað, uppgrivið og bulldosað, so at pláss verður fyri fleiri motorvegum. Um allan sjónarringin í Dublin standa ómetaligir byggikranar. Landið, sum fyri einum 20 árum síðan var tilafturskomið og fátækt, er vaknað og brølar frameftir. Hin Keltiski Tikarin er vorðin ein av heimsins mest undurfullu búskapum við góðum og sanniliga eisini ringum avleiðingum. Tann sosiali ójavnin dýpist. Tað eru ikki øll, ið klára at fylgja við**





Niels Pauli og Júst í miðbýnum í Derry



Vit fýra á pub í Derry

**3. partur**

ÚTFERÐ
*Sonne Smith*
*Myndir: Eirikur Ólason Simonsen*

Hetta og mang annað sat eg og hugsaði um, meðan vit sigldu við 40 míla ferð um Írska Havið úr suðurvesturskotsku ferjuhavnini Stranraer til Belfast í Norðurírlandi. Vit sigldu við einari eskjuformaðari superferju hjá altjóða felagnum Stena Line. Eitt fantastiskt, futuristiskt far, hvørs 100.000 hestar eru drívkraftin hjá fýra jetdysum.

### Eitt búskaparligt undur

Eitt sindur kunnar tú teg um lond, sum tú ongantíð hevur verið í. Tað er sum eitt ævintýr, at lýðveldið Írland hevur verið fyri einum búskaparligum vøkstri, ið ikki hevur sín maka í øllum Vesturheiminum. Arbeiðsloysið er raplað niður, og tann grøna oyggin er broytt frá at vera eitt samfelag við hópútflyting til stórinnflytara av arbeiðsmegi. Har eru ómetaliga nógvir asiatar, og eystureuropearar í stórum tali.

Írar eru ernir av viðburðinum, ið hevur beint burtur ta gomlu mýtuna um, at teir eru eitt fólk, ið letur seg villleiða av dovnum yrkjarum og fyllibyttum, hóast drykkjuskapurin hevur vundið nógv upp á seg, meðan tikarin skorar seg fram í heimsbúskapinum. Veruleikin er, at írar eru millum tey dúgligastu í ES, sum eisini hevur sprænt nógvar milliardir í írska búskapin.

Búskaparvøksturin hevur fingið kelinavnið: Tann keltiski tikarin. Mong grundin er til, at rovdjórið hevur murrað í vælveru tey seinnu árini. Ein liberalur vinnulívspolitikkur, Vinnufelagsskatturin er lítil, og fakfeløgini eru veik. Harafturat er Írland strategiskt millum Norðuramerika og Europa, høvuðsmálið er enskt, útbúgvingarskipanin gerst alsamt meiri vinnulig, og hvørt ár fara eini 30.000 ung út á arbeiðsmarknaðin.

Fólkatalið er bara 3,9 milliónir. Høvuðsmálið er írskt – fyrsta almenna mál. Annað almenna mál er enskt, men bara trý prosent tosa írskt.

### Belfast

Minnist sangin hjá Bony M, Belfast. Minnist hvussu syrgilig søgan um norðurírska høvuðsstaðin var. Søgan um bilbumburnar, hatrið, borgarakríggið, stongdar býarpartar, alvápnaðar bretskar hermenn.

Og makliga bilsin var eg, tá ið vit koyrdu gjøgnum miðbýin í Belfast. Her búgva 500.000 fólk. Belfast liggur við ta víðu Lagan-ánna. Høgar herður stenda rundan um henda gamla ídnaðarbýin, her Titanic varð smíðaður í 1912.

Her var alt stak friðarligt, og als einki arr sást frá krígnum.

Vit fóru nú at leita eftir einum Bed & Breakfast ella hotelli. Seint var, og vit óttaðust fyri, at náttin fór at koma á okkum. Einki var at fáa. Eingin mikroskopiskur møguleiki fyri at gista. Nú vóru vit keddir og móðir. Royndu eina seinastu ferð á Hilton-hotelli. Einki. Her var studentaball. Akkurát sum í Havn, tá ið pisurnar eru floygdar. Øll familjan, allir kenningar súgva seg inn á hvørt tað einasta gistingarhús í býnum. Hvat skulu vit gera? Jú, latið okkum spyrja ein taxa-sjafør, um hann vil koyra framman fyri okkum og finna okkum eitt gistingarhús. Tað vildi so til, at ein skemtiligur sjaførur vildi hjálpa okkum. Hann hjálpti okkum ímillum túrar í fleiri tímar, ringdi fyri